# Nýtt frá Bókadeildini

**Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur í hesum døgum út fimm nýggjar bøkur til børn og ung**

NÝGGJAR BØKUR
*Anna V. Ellingsgaard*

Til tey smæstu kemur bókin *Lítli Lávus frá høvdi til fót,* um ein rundan, lítlan drong, sum goymir seg aftan fyri ymiskt. Tey smáu kenna




kanska Lávus aftur frá teimum fýra væl dámdu bókunum um hann, sum komu út síðsta ár.

*Lítli Lávus frá høvdi til føt* er innbundin og 16 bls. Marna Jacobsen týddi.

Myndabókin *Gruffalo*, sum Julia Donaldson hevur skrivað og Axel Scheffer hevur myndprýtt, gjørdist sera væl dámd, tá ið hon kom út í Onglandi, ja, so væl, at hon varð gjørd til sjónleik, sum verður spældur fyri børnum runt um í Onglandi. Bókin sigur frá um eina mús, sum noyðist at finna uppá eitt øgiligt dýr fyri at sleppa undan at verða etin av hinum dýrunum. Men hvat hendir, tá ið músin knappliga hittir gruffalodýrið, sum hon




hevur rætt øll hini við?

Anna Maria Reinert Jensen hevur týtt *Gruffalo*, sum er 24 bls.

Onnur krimisøgan fyri børn kemur nú út á føroyskum. Tað er Sámal




Kr. Jacobsen, sum hevur týtt *Gistingarhúsgátuna*, sum sigur frá, hvat hendi, tá ið tann fína familjan Åkerø fer á gistingarhús og við sær hevur ein sera virðismiklan kinesiskan súreplamops. Okkurt løgið er á gistingarhúsinum, men til alla lukku eru detektivarnir Lassi og Maia har fyri at loysa málið. Bókin er løtt at lesa og væl egnað til tey 8-10 ára gomlu. *Gistingarhúsgátan* er 76 bls. og innbundin.

Enski rithøvundurin Georgia Byng sigur um høvuðspersónin í *Ótrúligu hypnosubókini hjá Molly Moon,* at hon hevur skrivað um hend-




ingarnar, sum Molly er fyri, tí at hon heldur tað vera órættvíst, at summi børn hava so ringar umstøður. Tey hava brúk fyri, at okkurt heilt ótrúliga gott fer at henda.

Molly býr á barnaheimi, har tey ikki fara væl við børnum. Ein dagin kemur hon fram á eina hypnosubók, sum gevur henni vald yvir fólki og fær tað ótrúligasta at henda.

Elna Skylv Hansen hevur týtt *Ótrúliga hypnosubókin hjá Molly Moon.* Bókin er heft og er 332 bls.

Til tey ungu gevur Bókadeildin út bókina *Anja – biddarabarn í Moskva* eftir




Mecka Lind. Jacob Meinhard Sólbjørg týddi úr svenskum. Bókadeildin hevur fyrr givið út bøkur eftir Mecka Lind um børn, ið eru heimleys. Í 1996 kom bókin *Sanna, gøtubarn*, í 2002 *Isabel – gøtubarn í Rio.*

Tólv ára gamla Anja firnast tey fremmandu, sum eru komin at vitja ommu hennara. Hon grunar ilt, men dugir ikki at ímynda sær ta ræðuligu lagnu, sum tey fremmandu ætla sær. Skaldsøgan er grundað á veruleikan hjá biddaratrælum og gøtubørnum í Moskva, soleiðis sum tey uppliva hann hvønn einasta dag.

Bókin er 273 bls. og heft við klaffum.

Allar bøkurnar eru at fáa í bókahandlunum.

## Andlát og jarðarferðir

**Sveinbjørn Kvilt**, Skála, ættaður av Eiði andaðist 17. juli, 83 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Tollak Joensen**, ættaður av Oyrabakka, búsitandi í Gøtuborg, Svøríki, andaðist 5. juli, 65 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Jógvan Vík** úr Haldarsvík andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 17. juli, 63 ára gamal. Farið verður úr kapellinum mikukvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Haldarsvíkar kirkju hósdagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Jógvan Vík kunnu lata eina peningagávu til Sinnisbata. Konto í Føroya Sparikassa.

Kistan við **Henrikku Hansen**, Nes, fór av Landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl. 17. Jarðarferðin verður mikudagin kl. 14.00, úr Nes Kirkju. Tey, ið vilja minnast Henrikku, kunnu lata eina gávu til Vesturskin.

**Jona Eidesgaard**, Tvøroyri, andaðist mánadagin 17. juli, 88 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Jon Gulak Jacobsen**, ættaður úr Hvalba, andaðist á sjúkrahúsinum í Gentofte, sunnudagin 16. juli, 55 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Jansy Feilberg**, Fuglafjørður andaðist á heiminum á Mýrinum mánadagin 17. juli, 85 ára gomul. Jarðarferðin verður lyst seinni.

**Sigmund Bech**, Tvøroyri, andaðist á Suðuroyarsjúkarhúsi sunnudagin 16. juli, 77 ára gamal. Jarðarferðin var mikudagin klokkan 13.00.. Tey, ið vilja minnast Sigmund, kunna lata eina peningagávu til Føroya felag móti krabbameini; konta í peningastovninum.

## Dagurin í morgin

Elias. Dagurin verður hildin til minnis um profetin Elias, sum Kongabøkurnar í Gamla testamenti siga frá. Í Føroyum hevur hann fingið navnið Líggjast.

Bíbilskt navn, ið merkir Jahve er Guð mín.



Lesið Sosialin so eru tit við

## Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Sølvá á Gerðisbakka**
Leirvík

andaðist og varð jarðað.

Takk til prest, kirkjutænarar og tykkum í missiónshúsinum fyri alla ta hjálp vit fingu.
Takk fyri uppringingar, blómur og kransar og tit øll, sum hjálptu á annan hátt.
Eisini ein serstøk tøkk til tykkum í Danmark, sum vóru har fyri okkum.
Takk til tykkum mongu, sum tóku ímóti í Leirvíkar kirkju og sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Anna M, Theodor, Oddfríður, Sóleyð, Jóhan P., Sunnleyg, Bjarti og Brynhild**